ítróttur

Nr. 130 • hósdagur • 11. juli 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Hondbólturin og fótbólturin stoyta saman

**Orsakað av landsdystum í januar mánað, byrjar hondbóltskappingin tvey vikuskiftið, áðrenn hon plagar**

HONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Nú hondbóltskappingin hjá teimum fremstu deildunum er løgd, er tað greitt, at hondbólturin og fótbólturin koma at stoyta saman. Landskappingin í fótbólti er sett til at enda leygardagin 5 oktober, og sambært kappingarnevndini í HSF, verður fyrsta umfarðið í hondbóltskappingini sunnudagin 29 september. Undanfarin ár er landskappingin í hondbólti byrjað vikuskiftið eftir, at fótbólturin er endaður, men í ár hevur hondbóltssambandið verið noytt at broyta hetta.


*Nú landskappingarnar í hondbólti og fótbólti renna saman, er líkt til, at Marius Joensen verður noyddur at velja ímillum hondbóltin ella fótbóltin.*

### Landsliðið í eldin

Atvoldin til broytingina er, at manslandliðið í hondbólti skal spæla EM-undankapping í januar mánáð. Í januar mánað verður so steðgur í landskappingini hjá 1. deild monnum í tríggjar vikur. Fyrivarnið er eisini tikið fyri landsliðsvenjingunum í heyst, har dagarnir 20. oktober og 24 november er lagdir av til landsliðsvenjing. Steðgurin í januar mánað rakar ikki kvinnuhondbóltin, og 20. oktober og 24 november verða eisini dystir leiktir í kvinnudeildini.

### Strandingar serliga raktir

Seinnu árini er talið av spælarum, sum bæði íðka hondbólt og fótbólt á hægsta stigi, alsamt minkandi. Krøvini til báðar ítróttargreinirnar eru vorðin so stór, at tað nærmast er ómøguligt at luttaka á hægsta stigi í báðum ítróttagreinum. Hetta hevur so eisini viðført, at leikarar hava valt tí einu ítróttargreinina frammum.

Eftir, at Skála flutti upp í bestu fótbóltsdeildina, hava fleiri av leikararnum úr STÍF verið at sæð á besta liðnum. Nevnast kunnu, Bent Djurhuus, Alexander Johansen, Leivur Justinussen, Marius Joensen og Sveinur Justinussen, ið allir koma at vera í eini tvístøðu, tá kappingarárið í hondbólti byrjar aftur. Vísir tað seg, tá hondbólturin byrjar, at skálamenn longu eru fluttir niður í aðru deild, so kann væl hugsast, at teir taka hondbóltin frammum. Undir øllum umstøðum kunnu spælararnir á besta liðnum hjá Skála ikki bæði klára fyrireikingarnar til hondbóltskappingina, og fáa endaspurtin á fótbóltskappingini við, so líkt er til, at spælararnir á Skála mugu velja ímillum fótbóltin ella hondbóltin.

## Skrá yvir tvey tey fyrstu umførðini í bestu kvinnu- og mansdeildini

| Dagur | Dato | kl. | Heima | Úti | Høll | Deild |
|---|---|---|---|---|---|---|
| sun | 29.sep | 14.30 | Neistin | Kyndil | H | 1. kv |
| sun | 29.sep | 16.00 | Neistin | Kyndil | H | 1. m |
| sun | 29.sep | 16.00 | H 71 | KÍF | Hoy | 1. m |
| sun | 29.sep | 15.00 | VB | Stjørnan | V | 1. kv |
| sun | 29.sep | 14.30 | VÍF | Tjaldur | Ve | 1. kv |
| sun | 29.sep | 16.00 | VÍF | Tjaldur | Ve | 1. m |
| sun | 06.okt | 14.30 | Kyndil | STÍF | H | 1. kv |
| sun | 06.okt | 16.00 | Kyndil | STÍF | H | 1. m |
| sun | 06.okt | 16.00 | KÍF | Neistin | Hoy | 1. m |
| sun | 06.okt | 15.00 | Stjørnan | Neistin | K | 1. kv |
| sun | 06.okt | 14.30 | Tjaldur | VB | R | 1. kv |
| sun | 06.okt | 16.00 | Tjaldur | H 71 | R | 1. m |

## Annika Thomsen skal spæla við Kyndli


*Annika Thomsen fer komandi ár at spæla við Kyndli*
*Mynd: Savnsmynd*

**Høgi bakspælarin verður komandi ár at síggja í grønu troyggjuni hjá Kyndli**

HONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Annika Thomsen, ið hevur spælt øll ungdómsárini við Neistanum, hevur valt at skifta bláu troyggjuna út við tí grønu hjá Kyndli. Annika sigur við Sosialin, at hon hevði hug at royna okkurt nýtt, og tí valdi hon at skifta til Kyndil. Hon leggur eisini dent á, at tað er ikki tí nakað galið í Neistanum, men heldur tað, at hon saknaði eina nýggja avbjóðing. Annars fortelur Annika, at Kyndlakvinnur hevur vant í tríggjar vikur, og hon fallin væl til í nýggja felagnum.

Umframt Anniku Thomsen, arbeiðir Kyndil við at styrkja seg enn meira til komandi kappingarár, men enn er onki endaliga greitt. Kyndlakvinnur eru so smátt farnar undir at venja, tær renna tvær ferðir um vikuna og venja við bólti tvær ferðir, men tað verður ikki fyrr enn í august, at rættiliga verður lagt til brots við venjingini.

# Marita Hermansen og Christina Holm til Neistan

**1. kvinnulið hjá Neistanum missir fleiri týðandi spælarar komandi kappingarár, og tí hevur felagið roynt finna sær styrk aðrastaðni**

HONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Eftir, at tað gjørdist greitt at 1.kvinnulið hjá Neistanum missir fleiri týðandi spælarar komandi kappingarár, hevur felagið verið úti um seg eftir spælarum. Nú er so greitt, at málverjin, Marita Hermansen og strikuspælarin Christina Holm verða at síggja í Neistanum komandi ár.

Marita Hermansen kemur heimaftur úr Kyndli, har hon hevur spælt í nøkur ár. Marita spældi ungdómsárini í Neistanum, og hevur nú valt at venda heimaftur til barndómsfelagið. Málverjin var ikki við teir flestu dystirnir hjá Kyndli í fjør, men í ár ætlar hon at gera meir við hondbóltin.

Sterki strikuspælarin, Christina Holm, kemur úr VB, og skal ivaleyst loysa ársins spælara í fjør, Gunnleyg Berg, av. Christina var so óheppin at slíta hælsinuna í fjør, og tí er hon í løtuni til uppvenjingar. Úr Neistanum siga tey, at uppvenjingin gongur væl, og væntast kann, at Christina byrjar at venja saman við hinum Neistakvinnunum seinast í august mánað. Umframt Christinu og Maritu, so hevur verið greitt í eina tíð, at Jórun Ludvig eisini fer at spæla fyri Neistan komandi kappingarár.

Aftrat Gunnleyg Berg, so missir Neistin eisini, Katrina á Neystabø, Biritu Wardum og Anniku Thomsen komandi kappingarár. Úr Neistanum verður sagt, at tá felagið missir so týðandi leikarar, er felagið noytt at finna styrk aðrastaðni.

1. kvinnulið hjá Neistanum fer undir fyrireikingarnar til komandi kappingarár fyrst í august mánað.


*Komandi kappingarár verða Christina Holm og Jórun Ludvig liðfelagir í Neistanum.*
*Mynd: Savnsmynd*



# Kollfirðingar fyri fyrstu ferð



**53 bátsmanningar hava boðað frá luttøku í næstsíðsta FM róðrinum, sum verður í Miðvági leygardagin**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Áhugin fyri at taka lut í kappróðrinum er framvegis stórur, sjálvt um nógv bendir á, at fleiri kappingar um FM heitið so at siga eru avgjørdar.

At áhugin er stórur, sæst á tilmeldingini til vestanstevnu róðurin, sum verður í Miðvági leygardagin. 53 manningar hava boðað frá luttøku. Tað er umleið sama luttøkutal, sum hevur verið á hinum stevnunum.

Fyri fyrstu ferð í ár er Kollfirðingur við í kappingini millum 6–-mannaførini við monnum. Kollfirðingur hevur ikki verið við í hinum róðrunum. Tað hevur við sær, at hann hevur ikki rætt at taka lut í ólavsøkuróðrinum. Reglurnar siga, at fyri at hava rætt at taka lut í ólavsøkuróðrinum skal bátur frammanundan hava luttikið í minsta lagið í trimum kappingum.

### Luttakararnir í vestanstevnuróðrinu m

5-mannafør dreingir
1. Junkarin
2. Drekin
3. Havfrúgvin
4. Blikur
5. Sílið
6. Fípan Fagra
7. Tjaldrið
8. Ørnin

6-mannafør kvinnur
1. Hvessingur
2. Snopprikkur
3. Gongurálvur
4. Riddarin
5. Jarnbardur
6. Páll Fangi 1G
7. Lómur 1G
8. Víkingur

5-mannafør gentur
1. Junkarin 1G
2. Dúgvan
3. Royndin Fríða
4. Frúgvin
5. Ørnin
6. Blikur
7. Fípan Fagra 1G
8. Sílið
9. Drekin
10. Havfrúgvin 1G
11. Tjaldrið
12. Tekla
13. Broddur
14. Firvaldur

6-mannafør menn
1. Riddarin
2. Víkingur
3. Snopprikkur
4. Sølmundur
5. Strálan
6. Gongurálvur
7. Smyril
8. Páll Fangi
9. Hvessingur
10. Jarnbardur 1G
11. Hósvíkingur
12. Kollfirðingur

8-mannafør
1. Ørvur
2. Nevið Reyða
3. Argjabáturin
4. Kvívíkingur
5. Knørrur
6. Húsavíkingur 1G

10-mannafør
1. Klaksvíkingur
2. Eysturoyingur
3. Vestmenningur
4. Havnarbáturin
5. Nólsoyingur

## Upp-og niðurflytingardystur hjá 1. og 2. deild kvinnum

Nú landskappingin í kvinnufótbólti er farin í summarfrí, er bert ein dystur eftir at leika. Avgerð skal finnast, um hvat fyri felag, skal fylgja Skála upp í 1.deild til endaumfarið. Niðasta liðið í 1.deild og nummar tvey í 2.deild skulu leika um síðsta sessin í bestu kvinnudeildini. Nummar tvey í 2. deild gjørdist AB og tær skulu leika ímóti GÍ í einum upp- og niðurflytingardysti.

Dysturin ímillum AB og GÍ er ásettur til 27.juli, og verður leiktur á ovara vølli í Gundadali kl. 16.00. Dómari verður Georg Rasmussen úr B36

**phj**

## Renning á Vestanstevnu

TÍÐINDASKRIV

Sum vanligt á summarstevnum verður skipað fyri renning á Vestanstevnu, sum verður í Miðvági nú leygardagin 6. juli.

Kappast verpur í ymsum bólkum hjá vaksnum og børnum. Startur og mál er við fótbóltsvøllin.

Kappingin byrjar kl. 12.00, tá tey vaksni renna 15 km. Runnið verður úr Miðvági vestur til flogvøllin og aftur. Meðan tey vaksnu renna hendan langa teinin, fara børnini at renna. Fyrst renna børn sum eru fødd 1995 ella seinni, tey renna 450 m. So renna børn sum eru fødd 1992-1994, tey renna eisini 450 m. So renna børn sum eru fødd 1989-1991, tey renna 900 m. Síst renna tey sum eru fødd 1985-1988, tey renna eisini 900 m.

Nummar 1,2 og 3 í øllum bólkum hjá gentum og dreingjum fáa heiðursmerki.

Tey, ið ætla sær at luttaka, skulu melda seg til við fótboltsvøllin frá kl. 11.30. Øll eru vælkomin.

# Kappróðurin í Miðvági er útsettur

**Tað ber ikki til at rógva teir túsund metrarnar fyrrenn tað er hálvfløtt, og tað verður tað ikki leygardagin fyrrenn klokkan fimm**

VESTANSTEVNU KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Kappróðurin á vestanstevnu í Miðvági nú leygardagin verður ikki klokkan trý seinnapartin, soleiðis sum hann annars hevur verið á øllum hinum stevnunum í summar. Í staðin verður kappróðurin klokkan fimm seinnapartin. Tað varð greitt fyrr í hesi vikuni. Róðrarfeløgini hava fingið boð um hetta, og vit hava skilt tað soleiðis, at ferðin hjá Smyrli vestur í Vágar og aftur til Havnar og Suðuroyar er løgd eftir – sammett við hinar stevnurnar – óvanligu róðrartíðini.

At kappróðurin leygardagin er útsettur til klokkan fimm kemst av umstøðunum at rógva. Í Miðvági verður bara róð á túsund metrum. Málið er frá grótkastinum og inn ímóti sandinum. At siga, at tað verður róð inn ímóti sandinum, er kanska ikki heilt rætt. Endamálið er so at siga á sandinum, ella tað er so mikið tætt landið, at tað ber ikki til altíð at rógva alt málið.

– Tað er einki nýtt í tí, at tað er neyðugt at laga startin í kappróðrinum í Miðvági eftir sjóvarfallinum. Soleiðis hevur tað verið hvørja ferð, síðani grótkastið kom, og málið í Miðvági varð broytt, so tað bara verður róð á eitt túsund metrum og harvið innanfyri grótkastið.

Tað sigur Hannis Joensen, formaður í Róðrarsambandinum. Hann leggur afturat, at tað ber ikki til at starta róðurin, fyrrenn tað er hálvfløtt. Tað verður tað klokkan 17. Tá gongur tað akkurát at rógva, men tá broytast umstøðurnar rættuliga skjótt. Full flóð verður klokkan 19. Harðasti streymur í hesum umfarinum er nú fríggjadagin.

Sambært formannin í Róðrarsambandinum hevur verið tosað í Miðvági um, at fyrsta startskotið skuldi latast av klokkan 16.30. Men tað mæltu teir lokalkendu og royndu miðvingarnir frá. Teir mettu ikki, at tað fór at bera til at rógva á innasta partinum av róðrarteininum, tá tað ikki var meiri fløtt, enn tað fer at vera klokkan hálvgum fimm leygardagin.

Formaðurin í Róðrarsambandinum óttast ikki fyri, at tað fer at hava við sær, at tað fer at draga langt út á kvøldið, áðrenn 10–mannaførini sleppa framat, sjálvt um fyrsti róðurin ikki verður fyrrenn klokkan fimm:

– Fyri fýra árum síðani var FM kappróður í Miðvági. Ta ferðina settu teir met har vesturi. Ongantíð áður ella síðani hevur tað gingið so skjótt at avgreiða allar róðrarnar, sum tað gjørdi ta ferðina. Tá vóru tað ein tími og seks minuttir frá tí, at startskotið ljóðaði fyri fyrsta róðrinum og inntil 10–mannaførini vóru liðug at rógva. Alt valdast sjálvandi um veðrið. Men við royndunum frá seinastu kappingini í Miðvági í huga og við tí í huga, at tað higartil í ár hevur gingið skjótari og betri at skipa fyri, enn tað áður hevur gjørt, so er eingin orsøk at rokna við øðrum, enn at kappróðurin í Miðvági verður liðugur áðrenn útvarpstíð klokkan 18.30, heldur Hannis Joensen.